# Poul Sloan vinmaðurin hjá Petur Alberg

Tað sæst í dagbókini, at Petur Alberg hevur verið sera væl við Poul Sloan. Teir vóru systkinabørn. Pápi Petur var Djóni í Geil. Hann var beiggi Elspu, sum var giftur við gamla William G Sloan. Tað kann verða nevnt, at ein systir var Isalina, sum var gift við gamla Knút skómakaran, sum var ættaður úr Funningi. Tískil var Petur eisini systkinabarn yngra Knút skómakaran. Tað skilst á dagbókini, at tað eru góð viðurskifti í familjuni. Hetta merkist eisini á tí tollyndi sum verður víst teimum, sum fylgdu gamla Sloan.

Poul Sloan var elsta barn hjá Elspu og William Sloan. Hann var føddur í 1882 og var tískil trý ár eldri enn Petur. Hann giftist og búsettist í Aberdeen og doyði í 1952. Poul átti so í hvussu er ein son, sum kallaðist Eric, og hann eigur eina dóttir sum eitur Corin. Hon er fødd í 1950 og býr í London. Tað er tó ikki eydnast ættini at fáa samband við hana.

Poul er heilt ungur farin til Lerwick í Hetlandi, har hann hevur arbeitt hjá John Irvine, Ship & Commisssion Agent. Hann og Petur skrivaðu saman og fara vit at endurprenta eitt av brøvunum hjá Poul. Hann dugdi kanska ikki so væl at skriva danskt sum Petur, men hann hevði jú enskttalandi pápa, og hetta merkir eisini skrivingina eitt sindur. Men tað skilst, at Poul eisini hevur verið ein uppvaktur unglingi, sum hevur havt áhuga fyri tí, sum hevur gingið fyri seg. Poul stúrir eins og Petur fyri rovveiðuni hjá bretskum trolarum undir Føroyum.

Tað sigst eisini, at Poul hevur átt fyrsta fótbóltin í Føroyum, og hann hevði pápi hansara skaffað honum úr Bretlandi.

Brævið frá Poul er soljóðandi:



*Børnini hjá gamla Sloaan vóru systkinabørn Petur Alberg. Serliga væl var hann við Poul. Børnini eru hesi: Aftanfyri f.v.: Anna, f. 1885, Andrew f. 1896, Poul f. 1882. Frammanfyri: Ketty, Betty og Archibald f. 1890. Bert Andrew fekk eftirkomarar í Føroyum*

**Lerwick, 8 Mach 1899**

**Kære Peter**

Nu jeg er i Ro + Mag vil jeg skrive dig nogen Linjer. Jeg havde en god Rejse til Leith og derfra til Lerwick. Der har været gruelig Halloi i Grimsby og Hull over Trawlerne, men her i Shetland er de glade over, at de har faaet en saadan Lektie. Der var talet om i Parlamentet at sende en Orlogsdamper op til Færøerne, men jeg ved ikke ikke om de gøre det eller ikke.

Som du vist allerede har hørt, er Presidenten af Frankrig død, den nye hedder Loubet.

Jeg har spurgt nogle om den Kattalog nyttede noget, men alle siger, at det er noget Snyderi. Saa jeg vil ikke bestille det, men dersom det er noget andet, du kunde ønske, kan jeg købe dig det og sende Pengene op med et Fiskerskib.

Vejret har været meget koldt og stormfuldt disse sidste dage.

Hils Jovanis hos Julius og sig ham, at jeg har bestilt ham en Ordbog, som jeg vil sende, saa snart som jeg faar den. Hr Irvine var borte, naar jeg kom til Lerwick. Han var i Edinburgh, naar jeg var der, men jeg saa ham ikke.

Hilse din Far og Mor og alle hos Knud, Sven og Gunnar. Spørg Sven, om han gav mig Penge, da han gik, jeg husker det ikke.

Skriv nu hvad du ved om Trawlerne og Fiskeriet.

Nu slutter jeg med en venlig hilsen til dig og dine fra din hengivne Ven og Fætter Poul.

Síðan hevur Petur skrivað á brævið: Modtaget den 22 April 1899.
Tað hevur tískil verið hálvan annan mánaða um at koma fram.




*William G. Sloan, pápi Poul Sloan, vinmannin hjá Petur Alberg*



*Elspa, kona William Sloan, var fastur Petur Alberg*



Lerwick 8 Mach 1899

Kære Peter

Nu jeg er i Ro + Mag vil jeg skrive dig nogle Linjer. Jeg havde en god Rejse til Leith og derfra til Lerwick. Der har været gruelig Halloi i Grimsby og Hull over Trawlerne men her i Shetland ere de glade over at de har faaet en saadan

*Brot úr brævinum frá Poul Sloan*

Sosialurin